Lagt til rættis:
Sunneva H. Eysturstein
post@sosialurin.fo



# Opnari møguleikar til sangskrivarar

**- Tað er eingin ordiligur pallur til sangskrivarar at framføra á, sigur Guðrið Hansdóttir, tónlistarkvinna og ein av fyriskiparunum av mánaðarliga sangskrivara kvøldinum, eisini kallað singer/songwriter, ið byrjaði í Margarinfabrikkini seinasta vikuskifti**

Guðrið arbeiðir dagliga í Margarinfabrikkini saman við Fríða Bjørgvin, og saman hava tey tikið stig til at geva sangskrivarum eitt stað at koma fram og spæla sín tónleik. Tiltakið verður einaferð um mánaðin, og ætlanin hjá teimum er at hava ymsar sangskrivarar at framføra hvørjar ferð – bæði royndar sum óroyndar. Afturat sang og sangskrivara framførslunum er eisini opin mikrofon fyri øllum, ið ynskja at framføra okkurt. Tað veri seg yrkingar, tónleikur, sjónleikur, hvat sum helst. So leingi tað kann gerast í eina mikrofon og ein forstyrkjara.



*Sangskrivaratiltakið verður einaferð um mánaðin, og pláss er fyri øllum at framføra tónleik, yrkingar ella sjónleik, so leingi tað kann gerast í eina mikrofon og ein forstyrkjara*

*Mynd: Eyðun Müller Thomsen*





*Guðrið Hansdóttir og Fríði Bjørgvin eru bæði tónlistarfólk, umfram at starvast dagliga í Margarinfabrikkini og fyriskipa sangskrivaratiltakið*

*Myndir: Kristfríð Tyril*

### Egið og lænt

Til fyrsta sangskrivarakvøldið seinasta fríggjadag vóru tað Guðrið og Fríði, ið sjálvi framførdu. Guðrið nøkur løg av fløguni hjá sær, umframt eitt nýtt lag, ið kemur á næstu fløguna. Fríði nakrar egnar akustiskar útsetingar av løgum hjá Queens of the Stone Age, Linkin Park, Opeth og sínum egna bólki, Ineptus. Hann framførdi eisini tvey løg á føroyskum, ið pápi hansara hevur skrivað.

Næsta sangskrivaratiltakið verður 7. mars. Á skránni hetta kvøldið eru m.a Jóan Petur og Eva Maria Bláhamar. Eva Maria er ikki hoyrd fyrr, men Jóan Petur gav nýliga fløguna »Bow and Arrow« út. Hon hevur fingið góða umtalu og er blivin nógv spæld í loftmiðlunum. Jóan Petur hevur tó ikki gjørt nógv um seg alment, og mær vitandi er hetta fyrstu ferð, hann fer at framføra til eitt tiltak við egnum tónleiki.

### Feedback

- Vit gera tiltakið fyri at kunna bjóða sangskrivarum fram. Tað er annars eingin pallur fyri hesi at framføra sín tónleik. Inntil nú hevur tað verið soleiðis, at tey antin mugu fara á »lokalu barrina« og spæla singalong ella sita heima einsamøll og plinkra. Nú vilja vit hava tey fram, tí vit vita, at tað er ein rúgva av evnaríkum persónum har úti við einari rúgvu av tilfari, ið bara bíða eftir at sleppa at framføra tað fyri fólki. Einki er meira týdningarmikið fyri ein tónleikara, enn at fáa víst tað fram, ið ein ger, soleiðis at ein kann finna útav, hvar ein stendur. Um tað, sum ein hevur arbeitt við, er gott ella ikki; um fólk taka ímóti tí, greiðir Guðrið frá.

**Sunneva**

---

# Amerikanskt og enskt við nógvum føroyskum

**Dreingirnir í bólkinum eru júst afturkomnir úr London, har teir hava verið og tikið fløgu upp saman við Ken Thomas; viðurkenda framleiðaranum av sermerkta og ráða ljóðinum hjá m.a Sigur Rós og Sugarcubes**





*Ken Thomas, ið áður hevur arbeitt saman við m.a Sigur Rós, hevur verið við Boys in a Band í studio og framleitt tónleikin*

*- Komandi fløgan hjá okkum er inspirerað av tí gamla, amerikanska, men hon er framleidd í einum enskum høpi. Hetta tilsamans við nógvum føroyskum afturat ger heildina deiliga gigguta, sigur Pætur Zachariasson, forsangari í Boys in a Band*

Dreingirnir hava verið burturstaddir í ein mánaða. Fyrst framførdu teir á Eurosonic í Hollandi, og síðani fóru teir í studio beint uttanfyri London í tríggjar vikur.

- Tað hevur verið ordiliga feitt, sigur forsangarin Pætur Zachariasson.

- Eurosonic gekk væl. Sikkurt okkara besta framførsla nakrantíð. Vit fingu eisini skítfult av tilboðum um sáttmálar frá fólki í tónleikavinnuni aftaná. Men vit blanda okkum ikki uppí á tí frontinum. Akkurát nú fokusera vit sum bólkur mest uppá at fáa fløguna lidna.

Tað er managearin hjá bólkinum, íslendski Gísli Thor, sum er í samband við plátufeløg í Onglandi, Danmark og Íslandi og roynir at finna tað besta til teir. Tað, ið gevur ein sáttmála, sum er í trá við innanhýsis ynskini hjá bólkinum um m.a tónleik, tekstir, image, hvar teir spæla osfr.

### Ljóðføri við samleika

Á fløguni eru 12 løg, ið øll eru skrivað seinasta árið. Pætur heldur, at løgini veruliga eru komin til sín rætt á fløguni, og at tað m.a er tí, at teir hava brúkt nógva tíð uppá at geva øllum ljóðførunum hvør sín samleika.

- Framleiðarin, Ken Thomas, er tann mest óperfektionistiski persóninurin nakrantíð. Og tað er so ræðuliga feitt, tí hann hevur givið fløguni eitt lekkurt, rátt live-ljóð. T.d bleiv eitt lag ikki sungið umaftur, um eg sang eitt sindur falskt, men heldur tá eg ikki var ordiliga í løtuni, greiðir Pætur frá.

### Rátt og giggut

- Tónleikurin hjá okkum er ráður rokkur við einum greiðum bygnaði. Ljóðmessiga er fløgan inspirerað av tí gamla, amerikanska, men hon er framleidd í einum enskum høpi, ið er meira óperfekt í mun til tað amerikanska. Hetta tilsamans við nógvum føroyskum í ger heildina deiliga gigguta. Okkurt er ein total joke. Also, vit taka tað seriøst, tá vit eru í studio, men kunnu ikki lata vera við at flenna, tá vit hoyra tað, tí tað er so bygdasligt alíkavæl. Men tað er bara soleiðis, sum vit uppfata tað. Tað verður spennandi at hoyra, hvussu onnur hoyra tónleikin. Tí tað er heilt sikkurt Boys in a Band allan vegin í gjøgnum, bara við meira kanti og rokk'n'roll, sigur Pætur.

### Tíðarleysur tónleikur

Eingin dagfesting er ásett til, nær fløgan hjá boysunum kemur út. Tað verður nokk onkuntíð í hesum árinum, men teir hava ongan skund, sigur Pætur.

- Tað eru sjálvar framførslurnar, sum verða modeleraðar alt eftir, hvør tíðin er. Hvør bylgja er hægst í løtuni. Men framførslur og fløga eru hvør sítt univers, og tónleikurin á fløguni, soleiðis sum hann er skrivaður og tikin upp, er tíðarleysur. Løgini eru góð, óansæð nær tey verða givin út, og vit hava gott tol.

**Sunneva**